# Gleði og sangur hoyra saman

**- Eg veit ikki hví. Men vit sótu bara og snøftaðu harinni í kirkjuni. Hatta var virkiliga ein pen vígsla. Tey bæði, Niels og Ingibjørg, vóru ótrúliga vøkur. Heldur tú ikki eisini tað?!, segði ein kona eftir brúðarvígsluna seinnapartin í gjár**

BRÚÐARVÍGSLA
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Vesturkirkjan:** Spenningurin inni í kirkjuni er til at merkja og kenna.

Rættiliga nógv er komið inn í kirkjuna, og situr bert og bíðar eftir at urgan skal byrja sítt præludium og at brúðarparið skal koma til sjóndar í gongini.

Fólk práta saman um tað, sum nú skal fara fram. Og líkt er til, at øll eru sera spent til hesa vígsluna.

Við eitt er tøgn í kirkjuni, tí nú fer hurðin inn í kirkjuna upp. Nú vantar bert tað brúsandi urguljóðið frá urguleikaranum.

Men einki brús kemur frá urguni, bert eitt stillisligt lag frá urguleikaranum. Og nú sker ein kvinnurødd inn í kirkjurúmið við vakra lagnum ”Ave Maria”.

Brúdleypsfólkið ressast við, tí nú síggjast tey bæði vælskrýddu høvuðspersónarnir koma inn gjøgnum dyrnar – Ingibjørg vinstrumegin og Niels høgrumegin.

Virðiliga koma tey gangandi inn eftir kirkjugólvinum, væl borin av vakra lagnum hjá Mozarti. Tey koma nú fram til fremsta raðið. Hann fylgir henni á sín sess, og hegnisliga leggur hann brúðarslørið á sítt pláss har framvið beinkinum.

Hann fer yvir á sítt pláss í høgra borði. Tey standa eina løtu soleiðis, og náa líka at senda hvørjum øðrum eitt eydnusamt bros, áðrenn tey seta seg niður.

Tað gera tey so, og tað sama ger kirkjufólkið. Lagið hjá Mozarti er ikki liðugt enn, so fólk fáa gott høvi at njóta vakra sangin eina løtu aftrat. Tað tykist sum brúðarparið sjálvt dámar hetta lagið, tí bæði sita og vagga í takt við sangin.

Lagið er nú liðugt, og urguleikarin ger seg kláran til fyrsta sangin, tann so vælkenda sangin við slík høvi – Tit hús tykkum byggið!

Klokkan er 16:14 og vígslan av hjúnunum Ingibjørg Abrahamsen úr Fuglafirði og Niels Winther úr Havn er í gongd.

## Sangur og ást

Júst hetta við sanginum kom at seta sín serstaka dám á hesa brúðarvígsluna – og ikki minst orsøkina til hesa vígsluna.

Veruleikin er tann, at bæði Ingibjørg og Niels hava dámað væl at sungið. Og bæði valdu tey at offra ein part av frítíð síni í Kamarkórinum.

Um hetta mundið var tann ungi Leif Hansen úr Nólsoy leiðari í kórinum. Tað bar hvørki betri ella verri til enn at tey bæði funnu saman, og hósdagin 29. desember 2005 kl. 16 skuldu tey so vígast í Vesturkirkjuni og soleiðis gerast hjún fyri Gudi og monnum.

Hesin veruleikin við Kamarkórinum setti eisini sín serstaka dám á vígsluna. Í fyrsta lagi sang kórið ein sang til heiðurs fyri brúðarparið, og í øðrum lagi var Leif sjálvur kórleiðari til hetta høvið.

Í triðja lagi – og tað var kanska meiri sjálvsagt – var tað eisini júst hesin sami, Leif sum sat við urguna undir vígsluni.

## Ikki ráðaleysur

Fyrsti sálmurin er byrjaður, og presturin, Heri Joensen hevur gott eyga fyri, at alt skal ganga sum tað skal.

Øll skulu fáa nakað burtur úr henda dagin, eisini brúðarparið. Og við sínum gløgga eyga sær hann, at her er alt ikki sum tað eigur at vera.

Hann sær nevniliga, at brúðurin í allari rokanini úti í gongini helst hevur gloymt at taka sálmabókina við. Men prestur er ikki ráðaleysur.

Stillisliga fer hann á føtur við sálmabók í hond, og fer oman til brúðrina.

Hann hevur longu funnið sangin fram, og peikar tí Ingibjørg á fyrsta versið, so hon eisini kann syngja henda sangin, sum so greitt sigur, hvat grundarlagið er undir einumhvørjum hjúnarlagi – Orðsins klettagrund!

Sálmurin er nú liðugur, og prestur gevur tekn til urguleikaran at hann nú eigur næsta leikin.

Leif slær nakrar tónar ann, og løtu seinni fær kirkjufólkið høvið at hoyra ein part



*Ingibjørg festir eygu síni á komandi mann sín. Av sonnum eini eydnurík hjún*





*Ingibjørg hevði helst gloymt sálmabókina eftir úti í forkirkjuni. Tað sá prestur og gav henni eina hjálpandi hond*